# StÍF'ari nummar eitt



- Fimm mál í hondbólti eru einki. Serliga ikki móti vestmenningum, sum altíð kunnu koma aftur, men tað gekk so, helt Jústines Justinussen eftir dystin

**Ein av mongu fegnu áskoðarum í høllini í Vestmanna var Jústines Justinussen**

MEISTARAR
*Jákup Mørk*

Strandingar eiga nógvar trúgvar hondbóltsáskoðarar. Eingin ivi um tað. Men skal nakar teirra nevnast, so má tað verða Jústines Justinussen. Fyrrverandi stórskjúttin hjá liðnum, sum nú er pápi nýggja stjórskjúttan á liðnum.

Og at tað var ein fegin áskoðari, sum vit hittu eftir dystin, var einki at ivast í, tó at hann viðgekk, at tað hevði verið ræðuligt at hugt.

- Fimm mál í hondbólti eru einki. Serliga ikki móti vestmenningum, sum altíð kunnu koma aftur, men tað gekk so.

- Og orsøkin til sigurin var verjan. Hasir ungu leikararnir hjá okkum spæla ein fantastiskan dyst, og eitt nú heldur Borgar Áka Olsen í einum jarntaki allan dystin. Bara tað í sjálvum sær er fantastiskt, men sum heild spældu okkara ein góðan dyst.

**Besta nakrantíð**

Jústines hevur annars verið ein av teimum, sum hevur verið partur av drúgva ungdómsarbeiðinum hjá StÍF seinastu nógvu árini, og tí fegnaðist hann sjálvandi eisini um, hvussu bjørt framtíðin hjá liðnum sær út, havandi lága miðalaldurin í huga.

- Men tað er ikki bara tað. Árið í ár er tað besat hjá okkum nakrantíð. Umframt fyrstu deild hava vit vunnið aðru og fjórðu deild. Unglingar, dreingir 14b og dreingir 12 vórðu eisini meistarar, so her er nógv at fegnast um. Eisini fyri framtíðina.

- Tað er jú altíð so, at tú kanst keypa teg til eitt FM, men rætti vegurin má vera at nýta egið fólk, og so styrkja um hópin á ávísum plássum, og har hava vit í øllum førum verið hepnir við Costin og Marian, segði ein fegin Jústines at enda, áðrenn leiðin aftur gekk inn í rúgvuna av leikarum og fagnandi áskoðarum.

# Kaldur unglingi

**Hóast hann telist millum teir yngstu hjá StÍF, so tóktist Sveinur Justinussen ikki hava nakrar trupulleikar av týdninginum av dystinum leygardagin**

MEISTARI
*Jákup Mørk*



*- Sjálvandi ert tú spentur undan dystinum, men tað gloymir mann beinanvegin, sum dysturin byrjar, helt Sveinur Justinussen*

Hann hevur longu verið róptur sum eitt hitt størsta talentið í føroyskum manshondbólti, og leygardagin sýndi hann, at hann eisini hevur sálarligu styrkina til teir stóru dystirnar.

Sum so ofta var Sveinur Justinussen ein av hornasteinunum í sigrinum hjá StÍF, og sæð í mun til aldurin, er hetta einki minni enn imponerandi. Men sjálvur helt unglingurin ikki, at hetta var so øgiligt.

- Sjálvandi ert tú spentur undan dystinum, men tað gloymir mann beinanvegin, sum dysturin byrjar. Tá ræður bara um at koyra á, og tað mundi eisini ganga so toluligt í dag.

**Bert StÍF**

Sum 19 ára gamal við einum ári eftir á miðnámsskúlanum er sjálvandi nærliggjandi at spyrja, hvørt Sveinur hevur gjørt sær nakrar tankar um, hvar hondbólturin verður spældur eftir lokna skúlagongd. Og um hann hevur gjørt sær nakrar tankar um, at royna hondbóltseydnuna uttanlands.

- Neit, tað havi eg ikki. Fyri fyrst er tað bara StÍF, sum er aktuelt. Hvat eg geri eftir skúlagongdina, má eg so finna útav til ta tíð. Her heima er tað í øllum førum bara StÍF, sum telir, og tað skal vera eitt heilt fantastiska gott tilboð, um eg bara skal hgusa um at fara aðrastaðni, segði nýklækti meistarin at enda.

# Hatta var hart

**Costin Dumitrescu leikti sín seinasta dyst við StÍF leygardagin, og sjálvur sigur hann eisini, at hetta merkti fyrireikingarnar hjá sær sera nógv**

*- Innan í mær leikaði alt í, men yvir fyri leikarunum mátti eg sýna, at eg hevði tamarhald á øllum, segði Costin um fyrireikingarnar til dystin*



MEISTARI
*Jákup Mørk*

Tað var ein sjónliga rørdur venjari hjá StÍF, sum Sosialurin fekk orðið á, tá meistaraheitið var veruleiki.

Undan dystinum var greitt, at hetta varð seinasti dysturin hjá Costin Dumitrescu fyri felagið, og sum hann eisini vísti í upptaktini til dystin, so var tað við heilt serligum kenslum, at hann fór á vøllin.

Nú vit hittu hann eftir dystin, viðgekk hann eisini, at tað hevði verið tungt hjá sær persónliga, tá hann fyrireikaði seg og leikararnar til dystin.

- Eg veit ikki, hvat eg skal siga. Hetta var veruliga nakað stórt. Innan í mær leikaði alt í, men yvir fyri leikarunum mátti eg sýna, at eg hevði tamarhald á øllum, men nú er ikki mark fyri gleðini.

**Var róligur**

Costin leggur tó afturat, at kenslurnar hjá sær einamest vóru á persónliga støðinum, tí sjálvur ivaðist hann ikki í, at teir fóru at vinna hendan dystin.

- Tað skal ikki misskiljast, tí sjálvandi hevði VÍF sín møguleika, men eg hevði alla tíðina eina góða kenslu. Tað hevur eisini víst seg seinnu árini, at vit hava havt sera gott tak á VÍF, og tað livdu vit tíbetur eisini upp til hesaferð, sigur núy fyrrverandi StÍF venjarin at enda.



*Hatta var nakað lort, helt Áki, tá hann eftir dystin skuldi meta um, hví tað gekk, sum tað gekk*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nakað lort

**Áki Olsen mátti bara ásanna, at tað var StÍF, sum var betra liðið í avgerandi dystinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

- Eg veit ikki, hvat tað var, sum var galið, men har gekk bara ikki hjá okkum.

Somikið kontantur var Áki Olsen, tá vit eftir taptu gullmerkini spurdu hann, hvat tað var, sum ikki riggaði hendan dagin.

- Vit byrja dystin við at koma aftur um við einum seks málum, og tað ger sjálvandi, at vit alla tíðina mugu renna aftaná. Fyri steðgin megna vit tó at toga okkum væl innaftur, og satt at siga hava vit takið á teimum ta løtuni, men so steðgaði bara upp. Tað hevur í øllum dystunum móti StÍF verið so, at vit hava mist alt á gólvið fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, og tað hendi so aftur í dag.

- Tað er so nakað, sum vit bara kunnu iðra okkum um nú, men tað broytir so einki. Og skal rætt vera rætt, so spæla vit heldur ikki nakran góðan dyst í dag. Serlig álopssparturin koyrir illa, tí hóast teir skjóta 28 mál, so hava vit í flestum av dystum okkara verið um tey 30, men tað skuldi bara ikki vera í dag, segði ein vónbrotin Áki Olsen, tá hann stóð við bronsumerkinum. Eitt heiðursmerki, sum hann legði líka í.



EB/Streymur – KÍ 3-1 (2-1):

# KÍ í klønum tráði

**EB/Streymur setti enn eina ferð klaksvíkingar upp á pláss, og harvið er KÍ rættuliga kroyst í bólkaspælinum**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar eru ikki heilt avskrivaðir, men nú stendur á hjá teimum at vinna seg í fjórðingsfinaluna í steypakappingini. Um tað skal eydnast hjá KÍ, so skulu teir vinna teir báðar dystirnar, sum teir eiga á í bólkaspælinum. Annar verður á Argjum, og hin verður á heimavølli ímóti VB. Tað er ikki óhugsandi, at tað fer at eydnast hjá KÍ. Men tað er ikki ráð til fleiri hálvar og heilar kiksarar.

Hjá EB/Streymi stendur væl betri til. Teir hava meiri enn annað beinið í fjórðingsfinaluni, og tað skal vilja heilt illa til, um tað ikki fer at eydnast hjá teimum.

Leygardagin legði KÍ enn eina ferð rygg til tap ímóti EB/Streymi. Í fyrraárið vann EB/Streymur landskappingardystirnar ímóti KÍ bæði í Klaksvík og á Mølini. Higartil í ár hava teir vunnið báðar dystirnar í bólkaumfarinum í steypakappingini.

Hesa ferð legði KÍ seg framum eftir væl uppspælt álop í høgru. Harley Bertholdsen, Atli Danielsen og Eyðun Klakstein vóru saman við Arnold Joensen við í uppspælinum. Innleggið hjá neyvt til Hjalgrím Elttør, sum stútaði í málið.

Fyrstu løtuna høvdu klaksvíkingar sítt fólk frammarlaga, og hetta tóktist at stressa heimaverjuna ikki so lítið. Í hvussu so er skundaðu teir sær ofta at fáa bóltin langt burtur.

Málmøguleikarnir vóru fáir, men aftaná steðgin fekk EB/Streymur tvey mál. Í tí fyrra førinum var hepni uppií. Sorin Anghel, sum var annar álopsspælarin, royndi við skoti, sum varð blokerað til hin álopsspælaran, Magna á Lakjuni. Royndin hjá honum varð eisini taklað, men í tí førinum sigldi bólturin í boga omanfyri KÍ málverjan, Kartin Joensen og í málið.

Tá ið EB/Streymur legði seg framum, var Hans Pauli Samuelsen málskjútti. Marni Djurhuus legði innlegg ímóti KÍ verjan tóktist hava tak á, men so lótu teir bóltin fara. Úr rættiliga spískum í vinstru roynd Hans Pauli seg við hálvfluktara, sum fór í handara síðunetið. Eitt fint spark.

Í 2. hálvleiki vóru ikki nógvir málmøguleikar. Heimaliðið tóktist einki hava ímóti, at KÍ hevði bóltin nógv. EB/Streymur bíðaði og vardi á egnari hálvu, og so lúrdu teir eftir møguleikanum fyri snaráløpi. KÍ flutti bóltin nógv, men tað líktist ov nógv innandura fótbólti, og tað komu so at siga einki upplagdir møguleikar burturúr.

Magni á Lakjuni slerdi heimasigurin fastan. Sorin Anghel stakk fram til Magna á Lakjuni. Tað eydnaðist honum at temja bóltin inn um verjuna, og tá ið Kartin Joensen leyp út, megnaði Magni at lyfta bóltin upp um málverjan og í málið til 3-1.

Í 2. hálvleiki hevði Sorin Anghel størri møguleika at gera mál enn allir hinir møguleikarnir, sum tað eydnaðist at skora upp á, vóru. Men í hesum førinum sendi væl upplagdi álopsmaðurin kortini við síðuna av málinum.

Hjá KÍ var tað merkisvert, at Sámal Eyðfinn Poulsen, sum ikki hevur vant við besta liðnum tey seinastu fimm árini, kom á vøllin í 2. hálvleiki.

**Dysturin í tølum**

**EB/Streymur – KÍ 3-1 (2-1)**
0-1: Hjalgrím Elttør
1-1: Magni á Lakjuni
2-1: Hans Pauli Samuelsen
3-1: Magni á Lakjuni

**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Andrzej Pazek, Egil á Bø, Esmar Eiðisgarð – Marni Djurhuus, Marek Vierzbicki, Ronnie Samuelsen, Hans Pauli Samuelsen – Sorin Anghel, Magni á Lakjuni

**KÍ:** Kartin Joensen – Atli Danielsen, Jan Andreasen, Ove Nysted, Símun Joensen – Arnold Joensen, Jan Joensen, Allan Joensen, Harley Bertholdsen – Hjalgrím Elttør, Eyðun Klakstein.

VB–AB 3–0 (3–0):

# VB væl á veg í fjórðingsfinaluna

**Argjamenn, sum eru nógv plágaðir av skaðum, tykjast kunnu fáa møguleikar at standa seg í næstbestu deildini**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

VB er framvegis ósigrað í bólkaspælinum. Leygardagin vunnu teir fyri aðru ferð á AB. Harumframt hava teir megnað javnleikir á heimavølli ímóti KÍ og á útivølli ímóti EB/Streymi. Tað skal tiskil vilja heilt illa til, um teir ikki fara at megna at spæla seg í fjórðingsfinaluna.

AB hevur mist møguleikan at halda fram í steypakappingini. Tað leggja teir neyvan nakað í. Um tapini ímóti EB/Streymi, KÍ og VB kunnu brúkast at samanspæla liðið, sum í fyrsta umfarinum í landskappingini – á Sevmýri 17. mai – skal spæla ímóti TB, so er nógv vunnið. Trupulleikin hjá AB hevur verið, at so nógvir spælarar hava verið skaddir. Leygardagin vóru seks av stuðulsspælarunum ikki við orsaka av skaðum. Og ein legðist afturat langa listanum. Málverjin, Jóhan Stenberg, kom ikki á vøllin eftir steðgin, tí hann hevði trupulleikar við knænum. Í staðin vardi Magni Thomsen málið í 2. hálvleiki.

**Eingin ivi**

VB var væl betra liðið. Í 1. hálvleiki løgdu teir stórt trýst á, teir skoraðu trý mál, og so tóku teir tað meiri rólig eftir hvíldina.

Dan Djurhuus stútaði til 1-0, eftir at Palli Augustinussen hevði lagt innfyri úr høgru. Palli Augustinussen økti til 2-0. Birgir Jørgensen snittaði við høvdinum langa sending longri fram á vøllin, og Palli rann undan verjuni og inn í brotsteigin, áðrenn hann smekkaði til.

Stutt undan steðginum skoraði sera væl spælandi miðvallarin, Milan Kulic, síðsta málið. Talan var um fríspark úr 30-35 metrum, sum slapp at sigla millum spælarar á báðum liðunum og í kassan.

Í 2. hálvleiki fór ferðin hjá VB eitt sindur niður. AB slapp at vera meiri við í spælinum. Eyðun Samuelsen fekk en risa møguleika, men hann sendi langt omanfyri málið.

VB hevur undanfarnu ferðirnar spælt við fýra í verjuni. Hesa ferð var uppstillingin 3-5-3, tí fleiri av føstu monnunum vóru fráverandi – eitt nú var Boban skaddur og Dejan var leikbannaður.

Jákup Olsen var í miðverjuni. Hann er onkra ferðina komin inn, men hetta var fyrsta ferðin, at hann var á VB liðnum frá fyrsta bríksli.

**Dysturin í tølum**

**VB-AB 3-0 (3-0)**
1–0: Dan Djurhuus
2–0: Palli Augustinussen
3–0: Milan Kulic

**VB:** Bjarni Johansen – Michael í Lágabø, Eyðun Jacobsen, Jákup Olsen – Palli Augustinussen, Jón Gærdbo, Milan Kulic, Poul Poulsen, Dan Djurhuus – Birgir Jørgensen, Predrag Zivkovic

**AB:** Jóhan Stenberg – Svenning W. Hansen, Karl Leonsson, Bernhard Petersen, Uni Mortensen – Hans Jørgen Djurhuus, Signar Johannesen, Flóvin Jespersen, Brynleif Hansen – Johnny Samuelsen, Eyðun Samuelsen

Skála-HB 1-4 (1-1)

# Andrew komin fyri seg

**Toppskjúttin í føroysku kappingini í fjør, Andrew av Fløtum, skeyt reint hat-trick seinasta korterið, og syrgdi soleiðis fyri víðari luttøkuni hjá HB**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

HB kundi við sigri á Skála mest sum vissa sær víðari luttøku í steypakappingini. Og tá Skála samstundis er niðasta liðið í bólkinum, so er einki at ivast í, at tað var sigurin, sum havnarmenninir komu eftir.

Tað eydnaðist teimum eisini, men tað skuldi tó ganga hampuliga long tíð, áðrenn hesin var vissaður.

Fyrsta stóra partin av dystinum megnaðu heimamenninir nevnliga at halda HB'arunum, soleiðis at hesir ikki fingu gjørt stórvegis um seg. Gaman í fekk Carsten From lagt HB á odda heilt tíðliga í dystinum, men við einum máli frá Bogi Gregersen svaraði Skála aftur, og so hildu teir fast.

Stóri trupulleikin hjá HB mundi vera, at teir fingu ikki nóg nógva ferð á spælið, og tí megnaðu teir sjáldan at koma inn um Skála-verjuna, soleiðis at vandastøður kundu skapst.

Eitt korter fyri leiklok, eydnaðist tó loksins hjá HB at lata verjuna upp, tá júst innskifti Páll M. Joensen legði bóltin fyri føturnar á Andrew á Fløtum, og toppskjúttin frá í fjør vísti, at enn eru skógvarnir hampuliga gyltir.

Hetta tók luftina úr skálamonnum, sum nú eisini noyddust at flyta seg nakað niðan á vøllin, og so kundi HB revsa. Tvær ferðir afturat var Andrew rætti maðurin á rætta staðnum, soleiðis at talan í tølum gjørdist um nógv meira sannførandi sigur, enn tað í veruleikanum var talan um.

**Dysturin í tølum**

**Skála-HB 1-4 (1-1)**
0-1: Carsten From
1-1: Bogi Gregersen
1-2: Andrew av Fløtum
1-3: Andrew av Fløtum
1-4: Andrew av Fløtum

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

| Bólkur 1 | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 4 | 3 - 0 - 1 | 11 | 4 | 7 | 9 |
| 2 | B68 | 4 | 2 - 1 - 1 | 11 | 7 | 4 | 7 |
| 3 | FSV | 4 | 2 - 0 - 2 | 12 | 8 | 4 | 6 |
| 4 | TB | 4 | 0 - 1 - 3 | 2 | 17 | -15 | 1 |

| Bólkur 2 | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 4 | 3 - 1 - 0 | 9 | 2 | 7 | 10 |
| 2 | VB | 4 | 2 - 2 - 0 | 7 | 3 | 4 | 8 |
| 3 | KÍ | 4 | 1 - 1 - 2 | 6 | 8 | -2 | 4 |
| 4 | AB | 4 | 0 - 0 - 4 | 1 | 10 | -9 | 0 |

| Bólkur 3 | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 4 | 3 - 0 - 1 | 14 | 4 | 10 | 9 |
| 2 | GÍ | 4 | 3 - 0 - 1 | 9 | 7 | 2 | 9 |
| 3 | B36 | 4 | 2 - 0 - 2 | 7 | 6 | 1 | 6 |
| 4 | Skála | 4 | 0 - 0 - 4 | 4 | 17 | -13 | 0 |